# Pensjóns- & tryggingaravtala

millum

Betri pensjón

&

blf

# Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya

# INNIHALDSYVIRLIT


**§ 1: FORMKRØV**

Stk. 1 AVTALUPARTAR .......... s. 3
Stk. 2 AVTALUGRUNDARLAG .......... s. 3
Stk. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN .......... s. 3
Stk. 4 UPPTØKUTREYTIR .......... s. 3
Stk. 5 INNLIMAN .......... s. 4
Stk. 6 PENSJÓNSGJALD .......... s. 4
Stk. 7 PENSJÓNSALDUR OG UPPATHALD AV TRYGGINGUM .......... s. 4
Stk. 6 TILSKILAN .......... s. 5
Stk. 9 FARLOYVI .......... s. 5
Stk. 10 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI .......... s. 5
Stk. 11 AFTURKEYP .......... s. 6
Stk. 12 OGNARVIÐURSKIFTI .......... s. 6
Stk. 13 SKATTUR OG AVGJØLD .......... s. 6
Stk. 14 FRÁBOÐAN .......... s. 6

**§ 2: LÍVSTRYGGING - BÓLKATRYGGING**

Stk. 1 LÍVSTRYGGING .......... s. 7
Stk. 2 TILLAGAN AV DEKNINGUM OG TRYGGINGARGJØLDUM s. 7

**§ 3: LÍVSTRYGGING - ÍSKOYTISTRYGGING** .......... s. 7

**§ 4: ÓARBEIÐSFØRI**

Stk. 1 ÓARBEIÐSTRYGGING .......... s. 8
Stk. 2 GJALDSUNDANTØKA .......... s. 8
Stk. 3 HÁMARK FYRI ÁRLIGU ÓARBEIÐSFØRISUPPHÆDDINI .......... s. 8

**§ 5: SAMANSPARING**

Stk. 1 SAMANSPARING TIL EFTIRLØN .......... s. 9
Stk. 2 FYRITÍÐAREFTIRLØN s. 9
Stk. 3 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI .......... s. 10
Stk. 4 LUTFALL MILLUM PARTABRØV OG LÁNSBRØV .......... s. 10

**§ 6: ANNAÐ**

Stk. 1 ÓSEMJA .......... s. 10
Stk. 2 SÁTTMÁLAPARTAR - ÍGILDISKOMA .......... s. 11

**FYLGISKJAL NR. 1**

LUTFALL MILLUM PARTABRØV OG LÁNSBRØV .......... s. 12

## §1: FORMKRØV

### Stk. 1 AVTALUPARTAR

Pensjóns- & tryggingaravtalan er gjørd millum Betri pensjón og Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya.

### Stk. 2 AVTALUGRUNDARLAG

Afturat ásetingunum í avtaluni galda reglurnar í Almennu tryggingartreytunum hjá Betri pensjón, tryggingartreytir fyri bráðsjúku, tryggingaravtalulógin, rentutryggingarlógin og aðrar viðkomandi lógir.

Tryggingarnar verða roknaðar á útrokningargrundarlagnum hjá Betri pensjón, ið er góðkent av Tryggingareftirlitinum.

### Stk. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN

Avtalan er skrivað í tveimum einsljóðandi eintøkum og hevur gildi frá 01.05.2010.

Avtalan er galdandi fyri eitt ár í senn, men heldur fram um ikki annað er avtalað. Báðir partar kunnu - við 3 mánaða freist - siga avtaluna upp við skrivligari ávaring til tann 1. í einum mánaði.

Verður avtalan uppsøgd, fara allar tryggingarnar, sum eru teknaðar undir avtaluni, úr gildi sama dag, sum avtalan fer úr gildi.

Limir hava tá møguleika fyri at halda fram við sjálvstøðugari trygging við sama innihaldi, sum er galdandi fyri hesa avtalu. Tó verða tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

### Stk. 4 UPPTØKUTREYTIR

Við innliman svarar limurin heilsuspurningum, sum verða latnir Betri pensjón til støðutakan.

Um váðishæddin hækkar meira enn 25% í einum ári, kann Betri pensjón biðja um nýggjar heilsuupplýsingar.

## Stk. 5 INNLIMAN

Limir, sum ynskja at tekna sína pensjónsskipan hjá Betri pensjón, fylla út tekningarskjøl við innliman.

Tryggingin tekur við, tá Betri pensjón hevur móttikið neyðugar upplýsingar til skráseting og heilsuváttanin er góðkend.

Kann tryggingin ikki teknast til vanligar treytir, verður í hvørjum einkstøkum føri gjørd avtala um, hvussu eftirlønarskipanin verður sett saman.

Limir, sum koma undir herdar treytir og limir, ið við innliman eru 52 ár ella eldri, kunnu velja, at alt inngjaldið verður nýtt til eftirlønarsamansparing.

Betri pensjón letur tryggjaða liminum eitt pensjónsprógv, sum vísir, hvussu eftirlønarskipanin er sett saman, og hvørjar tryggingarupphæddirnar eru.

Eina ferð um árið verða nýggj ársyvirlit, sum vísa samanseting og kostnað, send teimum, sum koma undir hesa penjónsavtalu.

## Stk. 6 PENSJÓNSGJALD

Samlaða pensjónsgjaldið verður inngoldið mánaðarliga frammanundan av arbeiðsgevara í sambandi við lønarútgjalding.

Pensjónsgjaldið steðgar tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur fylt 67 ár.

Møguleiki er fyri at søkja um gjaldskáa í upp til eitt ár. Gjaldskái kann bert veitast, um tryggingargjald er goldið í minsta lagi eitt ár frammanundan, og samansparda virðið er hægri enn tryggingargjaldið í tíðarskeiðnum við gjaldskáa.

Fyri limir, sum ynskja at halda fram í starvinum, eftir at hesir hava fylt 67 ár, verður serlig avtala gjørd í hvørjum einstøkum føri. Víst verður til "Rundskriv um eftirlønargjøld, tá ið fólk starvast eftir 67 ára aldur" frá Lønardeildini, dagfest 12.12.2008, J.nr. 8300-0013/2008.

Doyr limur, áðrenn pensjónin fellur til útgjaldingar, fellur pensjónsgjaldið burtur frá 1. í mánaðinum eftir, at limurin doyði.

## Stk. 7 PENSJÓNSALDUR OG UPPATHALD AV TRYGGINGUM

Pensjónsaldur er tann 1. í mánaðinum eftir, at limurin er fyltur 67 ár. Ynskir limur at fáa eftirlønina útgoldna, áðrenn hesin fyllir 67 ár, er møguleiki fyri hesum, eftir at hava fylt 60 ár. Hetta er tó treytað av, at farið verður úr starvi.

Uppathald av tryggingum fylgir galdandi tryggingartreytum og einstaklingaavtalum, sum kunnu vera gjørdar.

## Stk. 8 TILSKILAN

Samansparingarparturin

Her kann útgjaldið einans tilskilast "næsta avvarðandi" ella hjúnafelaga, fráskildum hjúnafelaga, lívsarvingum, stjúkbørnum, fosturbørnum ella lívsarvingum teirra.

Hugtakið "næsti avvarðandi" fevnir í fyrstu atløgu um hjúnafelagan. Um eingin hjúnafelagi er, fáa lívsarvingar, t.v.s. børnini, tryggingarupphæddina. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært arvalógini.

Er eingin tilskilaður í sambandi við útgjald, verður útgoldið til búgvið.

Lívstrygging

Verður lívstryggingin goldin við skattaðum peningi, er eisini møguleiki fyri at tilskila onnur enn næstu avvarðandi. Er ynski um hetta, skal tað fráboðast skrivliga til Betri pensjón. Á heimasíðuni www.betri.fo finst skjalið "Tilskilan", sum skal útfyllast og sendast til Betri pensjón.

Hevur limurin innsett ein tilskilaðan í sambandi við deyða, verður útgoldið uttan um búgvið. Hetta er galdandi bæði fyri samansparing og bólkatrygging. Her kunnu kravánarar (kreditorar) ikki gera krav í upphæddunum.

## Stk. 9 FARLOYVI

Um limur fer í farloyvi, skal Betri pensjón hava skrivliga fráboðan um hetta skjótast tilber, og í seinasta lagi 1 mánað eftir fyrsta farloyvisdag.

Limur kann velja sjálvur at halda fram við at gjalda inn í farloyvistíðini, bæði til pensjón og tryggingar. Eisini er møguleiki fyri at søkja um gjaldskáa. Víst verður til §1, stk.3.

## Stk. 10 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI

Um limur fer í annað starv, ella á annan hátt ikki lýkur upptøkutreytirnar í hesi pensjónsavtalu, skal hetta fráboðast Betri pensjón skjótast gjørligt.

Limur kann venda sær til Betri pensjón og avtala, hvussu tryggingaravtalan skal halda fram. Møguligt er at halda fram við sama innihaldi, sum er galdandi fyri hesa avtalu. Tó verða tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

## Stk. 11 AFTURKEYP

Afturkeyp av samansparda virðinum kann einans fara fram í tráð við galdandi reglur í Rentutruggingarlógini. Er samanspart virðið flutt frá einari skipan har Fíggjarmálaráðið er sáttmálapartur, verður *"Reglugerð í samband við pensjónsskipanir, har Fíggjamálaráðið er sáttmálapartur"* at galda fyri henda partin av samansparingini.

## Stk. 12 OGNARVIÐURSKIFTI

Eftirlønarskipanin er ogn hjá liminum. Um farið verður í annað starv, sum liggur uttanfyri sáttmálaøkið, kann limurin taka eftirlønarskipanina við sær. Í slíkum føri eru reglurnar í stk. 11 galdandi.

Tá verða allar reglur og ásetingar í hesi avtaluni at galda fyri tann partin av nýggju avtaluni, sum stavar frá uppruna virðinum. Hetta uttan mun til, hvør rindar tryggingargjaldið framyvir.

Pensjónsprógvið er ikki umsetiligt, og kann tí ikki nýtast til veðseting fyri skuld og annað tílíkt.

## Stk. 13 SKATTUR OG AVGJØLD

Skattur og avgjøld, sum Betri pensjón er álagt at afturhalda, verður frároknað øllum útgjaldingum.

Samlaða gjaldið, sum arbeiðsgevarin rindar, er drigið frá skattskyldugu inntøkuni. Tískil skal tað ikki dragast frá í sjálvuppgávuni.

Stigvísar veitingar verða skattaðar sum A-inntøka.

Útgjøld í einum rinda avgjald til landskassan sambært rentutryggingarlógini (2010-35%).

Verður lívstryggingin goldin við skattaðum peningi, verður hon útgoldin skattafrítt. Verður tryggingin goldin við óskattaðum peningi verður, í samband við eitt møguligt útgjald, rindað avgjald sambært rentutryggingarlógini (2010 - 35%).

## Stk. 14 FRÁBOÐAN

Betri pensjón kunnar TAKS um tey viðurskifti, sum fráboðanarskyldan ásetur í samband við eftirlønarsamansparingar.

## §2: LÍVSTRYGGING - BÓLKATRYGGING

### Stk. 1 LÍVSTRYGGING

Verður útgoldin, um limur doyr, áðrenn hesin hevur fylt 67 ár.

Útgjaldið við deyða er tengt at aldrinum hjá einstaka liminum.

**Tryggingarupphæddir:**

| | | |
|---|---|---|
| 18-61 ár | kr. | 500.000 |
| 62 ár | kr. | 450.000 |
| 63 ár | kr. | 400.000 |
| 64 ár | kr. | 350.000 |
| 65 ár | kr. | 300.000 |
| 66 ár | kr. | 250.000 |
| 67 ár | kr. | 0 |

### Stk. 2 TILLAGAN AV TRYGGINGARGJØLDUM

Allar bólkatryggingar verða gjørdar fyri 1 ár í senn. Gjaldið verður eftirmett 1. januar á hvørjum ári.

## § 3: LÍVSTRYGGING - ÍSKOYTISTRYGGING

Ynskir limur eina hægri tryggingarupphædd við deyða enn ta upphædd, sum bólkatryggingin ásetur, kann hetta gerast á einstaklingagrundarlagi.

# § 4: ÓARBEIÐSFØRI

**Stk. 1 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING**

Limurin ásetur tryggingarupphæddina við innliman.

Árliga tyggingarupphæddin kann ikki setast lægri enn kr. 89.700,- (2010). Upphæddin svarar til ta inntøku, sum Almannastovan loyvir, áðrenn tey mótrokna í teirra veitingum. Fyri limir, sum við innliman eru 45 ár og eldri, er hetta ikki eitt krav.

Tryggingarupphæddin kann í mesta lagi vera 80% av lønini. Í sambandi við hægst loyvdu tryggingarupphædd, verður eisini víst til stk. 3.

Møguleiki er fyri at broyta valdu tryggingarupphæddina í tryggingartíðarskeiðnum.

Útgoldið verður, um limurin í tryggingarskeiðnum gerst 2/3 ella meira óarbeiðsførur. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum eftir 3 mánaða óarbeiðsføri. Fyrstu ferð tann 1. í mánaðinum eftir at 3 mánaða skeiðið er lokið. Tryggingarupphæddin verður útgoldin, so leingi óarbeiðsførið stendur við, og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til ásetta eftirlønaraldurin. Óarbeiðsførið skal vera staðfest, áðrenn limurin er fyltur 60 ár.

Treytin fyri at tryggingin kann fevna um óarbeiðsføristrygging er, at limurin ikki er fyltur 60 ár, tá tryggingin verður teknað.

**Stk. 2 GJALDSUNDANTØKA**

Tryggingin verður stovnað við rætti til gjaldsundantøku. Hetta merkir, at um limur gerst 2/3 óarbeiðsførur, rindar Betri pensjón framhaldandi tryggingargjaldið, t.v.s. bæði til eftirlønar-samansparingina og fyri váðisdekningarnar. Goldið verður eftir 3 mánaða óarbeiðsføri. Inngoldið verður, so leingi óarbeiðsførið stendur við, og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til ásettan eftirlønaraldur. Óarbeiðsførið skal vera staðfest, áðrenn limurin er fyltur 60 ár.

Treytin fyri, at tryggingin fevnir um gjaldsundantøku, er, at limurin ikki er fyltur 60 ár, tá tryggingin verður teknað.

Stk. 3 **HÁMARK FYRI ÁRLIGU ÓARBEIÐSFØRISUPPHÆDDINA**

Galdandi fyri stk. 1 og stk. 2 er, at samlaða árliga upphæddin við óarbeiðsføristrygging og gjaldsundantøku ikki er hægri enn kr. 300.000,-.

# § 5: SAMANSPARING

## Stk. 1 SAMANSPARING TIL EFTIRLØN

Samansparingin verður útgoldin tann 1. í mánaðinum eftir limurin hevur fylt 67 ár.

Møguleikar fyri samanseting

1. Útgjald í einum
2. Útgjald í lutum
3. Útgjald alt lívið

**1)** Inngjaldið verður í fyrstu atløgu nýtt til **"Eftirløn í einum"**. Inngjaldið til henda partin kann tó ikki fara upp um ásetta hámarkið fyri inngjøld til kapitaleftirløn. Hámarkið er ásett í Rentutryggingarlógini og verður dýrtíðarviðgjørt.

**2)** Inngjøld omanfyri nevnda hámark til kapitaleftirløn verða nýtt til eina **"Eftirløn í lutum"**, sum verður útgoldin í 10 ár. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum, fyrstu ferð tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin er farin frá við eftirløn. Doyr limurin í útgjaldingartíðarskeiðnum, fellur útgjaldið til tann/tey, sum limurin hevur tilskilað. Tá kann veljast millum, at útgjaldið heldur áfram, soleiðis at samlaða útgjaldingarskeiðið verður 10 ár, ella at kapitalvirðið, sum er eftir, verður útgoldið í einum.

**3)** Limir, sum ynskja hetta, hava eisini møguleika fyri at nýta samansparingina ella part av samansparingini til eina **"Eftirløn alt lívið"**. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum. Útgjaldið byrjar tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur fylt 67 ár, og stendur við, so leingi limurin er á lívi.

Limir kunnu eisini rinda inn eyka fyri at økja um eftirlønarútgjaldingina.

Við deyða áðrenn eftirlønaraldur, verður samansparda virðið goldið út í einum. Útgjaldið kann tilskilast "næsta avvarðandi" ella hjúnafelaga, fráskildum hjúnafelaga, lívsarvingum, stjúkbørnum, fosturbørnum ella lívsarvingum teirra.

Um eingin tilskilaður er, verður útgoldið til búgvið.

Sambært rentutryggingarlógini hevur limurin, eftir nærri ásetingum, møguleika fyri at broyta í útgjaldingarháttinum. Broytingin skal gerast, áðrenn limurin fer frá við eftirløn.

## Stk. 2 FYRITÍÐAREFTIRLØN

Ynskir limur at fáa eftirlønina útgoldna, áðrenn hesin fyllir 67 ár, er møguleiki fyri hesum, eftir at hava fylt 60 ár. Hetta er tó treytað av, at farið verður úr starvi. Tá verður útgoldið í mun til samansparda virðið á tryggingini, tann dagin farið verður frá við eftirløn.

Betri pensjón

### Stk. 3 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI

Samansparingin verður rentað við marknaðarrentu.

Við innliman kann limurin velja millum hesar íløgubólkar

- bert lánsbrøv
- lágt váðastøði (láns- & partabrøv)
- miðal váðastøði (láns- & partabrøv)

Ynskir limurin seinni at broyta íløgubólk er hetta møguligt. Broyting av íløgubólki kann gerast pr. tann 1. í einum mánaði. Hetta skal fráboðast í mánaðinum frammanundan. Tað er ókeypis hjá liminum at broyta váðastøði.

Avkastið av samansparingini, t.v.s. miðalrentan av tí valda íløgubolkinum, verður tilskrivað mánaðarliga á eftirlønarkontu hjá liminum.

### Stk. 4 LUTFALL MILLUM LÁNSBRØV OG PARTABRØV

Lutfallið millum lánsbrøv og partabrøv er tengt at aldrinum hjá einstaka liminum, sum víst í fylgiskjali nr. 1.

## § 6: ANNAÐ

### Stk. 1 ÓSEMJA

Eru viðurskifti, fevnd av hesum sáttmála, sum limurin er ónøgdur við, kann limurin venda sær til tryggingarkærunevndina.

Ein treyt fyri at reisa mál fyri kærunevndina er, at limurin fyrst hevur roynt at fáa í lag eina nøktandi loysn við Betri pensjón. Eydnast tað ikki, skal skrivlig kæra - skrivað á donskum - sendast kærunevndini saman við ávísum gjaldi. Um limurin fær heilt ella partvíst viðhald, verður gjaldið afturrindað.

Eftir umbøn frá liminum sendir Betri pensjón útfyllingarblað í sambandi við kæru. Betri pensjón er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

| | |
|---|---|
| Kæran skal sendast til: | Ankenævnet for Forsikring<br>Anker Heegaards Gade 2, 1.<br>DK-1572 København V.<br>Tel. +45 33 15 89 00 |

## Stk. 2 SÁTTMÁLAPARTAR - ÍGILDISKOMA

Pensjóns & tryggingaravtalan er gjørd millum Betri pensjón og Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya. Avtalan er skrivað í tveimum einsljóðandi eintøkum og hevur gildi frá 01.05.2010. Báðir partar kunnu uppsiga sáttmálan við 3. mánaða freist fram til tann 1. í einum mánaði.

Tórshavn, tann 29/4-2010 Tórshavn, tann 29/4.2010

**BETRI PENSJÓN** **BÚSKAPAR- & LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA**

Betri pensjón

# FYLGISKJAL 1

Galdandi býti millum láns- og partabrøv í mun til íløgupuljur (2010)

| Betri pensjón | Býtið millum láns- og partabrøv í mun til váðastøðir | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Lágt | | Miðal | |
| Aldur | Lánsbrøv % | Partabrøv % | Lánsbrøv % | Partabrøv % |
| 20 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 21 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 22 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 23 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 24 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 25 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 26 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 27 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 28 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 29 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 30 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 31 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 32 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 33 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 34 | 50,0 | 50,0 | 25,0 | 75,0 |
| 35 | 51,1 | 48,9 | 26,7 | 73,3 |
| 36 | 52,2 | 47,8 | 28,4 | 71,6 |
| 37 | 53,3 | 46,7 | 30,2 | 69,8 |
| 38 | 54,4 | 45,6 | 31,9 | 68,1 |
| 39 | 55,5 | 44,5 | 33,6 | 66,4 |
| 40 | 56,6 | 43,4 | 35,3 | 64,7 |
| 41 | 57,7 | 42,3 | 37,0 | 63,0 |
| 42 | 58,8 | 41,2 | 38,8 | 61,2 |
| 43 | 59,8 | 40,2 | 40,5 | 59,5 |
| 44 | 60,9 | 39,1 | 42,2 | 57,8 |
| 45 | 62,0 | 38,0 | 43,9 | 56,1 |
| 46 | 63,1 | 36,9 | 45,6 | 54,4 |
| 47 | 64,2 | 35,8 | 47,3 | 52,7 |
| 48 | 65,3 | 34,7 | 49,1 | 50,9 |
| 49 | 66,4 | 33,6 | 50,8 | 49,2 |
| 50 | 67,5 | 32,5 | 52,5 | 47,5 |
| 51 | 68,6 | 31,4 | 54,2 | 45,8 |
| 52 | 69,7 | 30,3 | 55,9 | 44,1 |
| 53 | 70,8 | 29,2 | 57,7 | 42,3 |
| 54 | 71,9 | 28,1 | 59,4 | 40,6 |
| 55 | 73,0 | 27,0 | 61,1 | 38,9 |
| 56 | 74,1 | 25,9 | 62,8 | 37,2 |
| 57 | 75,2 | 24,8 | 64,5 | 35,5 |
| 58 | 76,3 | 23,7 | 66,3 | 33,7 |
| 59 | 77,3 | 22,7 | 68,0 | 32,0 |
| 60 | 78,4 | 21,6 | 69,7 | 30,3 |
| 61 | 79,5 | 20,5 | 71,4 | 28,6 |
| 62 | 80,6 | 19,4 | 73,1 | 26,9 |
| 63 | 81,7 | 18,3 | 74,8 | 25,2 |
| 64 | 82,8 | 17,2 | 76,6 | 23,4 |
| 65 | 83,9 | 16,1 | 78,3 | 21,7 |
| 66 | 85,0 | 15,0 | 80,0 | 20,0 |
| 67 | 85,0 | 15,0 | 80,0 | 20,0 |
| 68 | 85,0 | 15,0 | 80,0 | 20,0 |
| 69 | 85,0 | 15,0 | 80,0 | 20,0 |



blf